## Skjótt klárar aftur

Svensku tvíburarnir, Susanna og Jenny Kallur, eru kendar frá frælsum ítrótti, men hava ikki verið við í kappingum í hálvtannað ár, tí tær hava verið skaddar. Nú gongur tó framá hjá báðum tveimum, og tær síggja ljóst upp á komandi kappingarárið, tí framgongdin er eyðsýnd. Báðar satsa uppá at vera klárar at kappast, tá EM-kappingin verður í summar.



## Fíggjarlig ávirkan

Um ein mánað byrjar svenska kappingin í kvinnufótbólti, men eisini har merkja tey fylgjurnar av fíggjarkreppuni. Øll feløgini í bestu kvinnudeildini, Damallsvenskan, hava skert hópar sínar, og tey hava ikki ráð til bestu spælararnar, sum tey annars hava havt tað fyrr. Umboð fyri fleiri feløg siga, at nú er at minka vónirnar og royna at byggja upp í staðin.

### VÍF-VB 33-25 (16-11):

# VB staðfesti sítt pláss

**VB fekk einki stig í Vestmanna í gjár. Tí er so at siga greitt, at vágskvinnur verða á aftasta plássinum, tá seinasta leikumfar er spælt. Víðkanin av Sunset-deildini er tí einasta bjargingin hjá liðnum**




Uni Holm Johannesen



VÍF vann greiðan sigur á VB, ið ongantíð megnaði at svara aftur, eftir at VÍF var farið avstað

Mynd: Álvur Haraldsen

11 av teimum 14 hondbóltsfeløgunum í landinum hava sent skriv til Hondbóltssambandið um at víðka bestu kvinnu- og mansdeildina til komandi kappingarár. Tá ársins útgáva av landskappingunum er avgeidd skal HSF at taka støðu um kappingarskipanina fyri næstu árini. Avgerðin kann gerast bjargingin hjá VB.

Tað verður at kalla vónleyst hjá VB at bjarga sær tilveruni í Sunset-deildini. Tað varð staðfest í gjár, tá vágskvinnur taptu greitt í Vestmanna. VB skal komandi vikuskiftið vitja StÍF, sum er næstniðast. Munurin millum liðini er fýra stig nú tveir dystir resta í. Tí er greitt, at ein víðkan av deildini kann verða bjargingin hjá liðnum.

**Hóttu ongantíð**

Skuldi VB framvegis gera sær vónir um at vinna seg av botnsessinum, var neyðugt við einum sigri á VÍF. Men gestirnir úr Vági hóttu ongantíð. VÍF rann avstað beinanvegin, og miðskeiðis í fyrra umfarinum skræddi guli herðurin seg leysar. Tá megnaði VB ongantíð at svara aftur.

Við avrikinum í gjár staðfesti vágskvinnur sítt pláss á stigatalvuni. Tær framdu eina rúgvu av mistøkum og spældi við væl lægri ferð enn heimaliðið.

Liljan Djurhuus var toppskjútti hjá VÍF. Hon skeyt 12 mál. Tað sama gjørdi Migle Senvaityte fyri VB.

**FAKTA**

**VÍF-VB 33-25 (16-12)**
**10 min**: 5-3
**20 min:** 10-7
**40 min:** 22-16
**50 min:** 28-22
**Málskjúttar**
**VÍF:** Liljan Djurhuus 12 (6), Agnas Olsen 6, Heidi Joensen 4, Halla Midjord 3, Elisa Leo 2, Tóra Seloy 2, Linda Davidsen 1, Finngerð Jensen 1, Torgun Johansen 1, Rakul Joensen 1
**VB:** Migle Senvaityte 12 (7), Bára Mortensen 5, Una Egillsdóttir 2, Rannvá Johannessen 2, Andrea Nielsen 2, Monika Samuelsen 1, Svava Vestergaard 1
**Brotskøst:** VÍF 7, VB 7
**Útvísingar:** VÍF 5, VB 7
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen

### Tjaldur-StÍF 30-14 (9-5):

# Grækarismessuhýrur

**Í seinna hálvleiki setti Tjaldur ferð á og rann frá StÍF, ið á ongan hátt megnaði at hótta. Dysturin bleiv avgjørdur í eitt korter, tá Tjaldur skoraði 13 mál og StÍF einki**




Hilmar Jan Hansen

Grækarismessa er ikki fyrr enn fríggjadagin, men longu í gjár fekst ein forsmakkur í ítróttarhøllini í Runavík, har fáur mundi ivast í, at okkurt Tjaldur longu var komið.

Ein ávísur spenningur var undan dystinum, tí nú hevði StÍF fyrr í vikuni havt Stjørnuna á knøunum, uttan tó at megna at halda, tá mest ráddi um. Ofta hevur StÍF eisini givið Tjaldri dygga mótstøðu, so tað kundi jú hent seg, at hetta fór at gerast ein av teimum døgunum.

Men longu, tá tað vísti seg undan dystinum, at StÍF ikki hevði sín besta skjútta, Rebekku Justinussen, við í Runavík, mundi standa teimum flestu greitt, at so var hóttanin í øllum førum ikki líka sterk. Tað var hon heldur ikki, tí í hesum dystinum var Tjaldur ongantíð tað allarminsta í vanda fyri at snáva ella søpla nakað burtur.

Verjuspælið hjá føroyameistarunum var einki at reypa av í fyrra hálvleiki, samstundis sum tað heldur ikki lá serliga væl fyri at skjóta mál í hinum endanum, tí tað komu ikki fleiri enn níggju í fyrra hálvleiki.

Guðrun í Lágabø var hinvegin so mikið væl uppløgd í Tjaldursmálinum hesa ferð, at StÍF púrt einki fekk burturúr, men bara skoraði fimm mál fyrsta hálva tíman. Tað man hava verið langt síðani síðst…

**Uttan profilarnar**

Í seinna hálvleiki fekk Tjaldur so alt tað upp á pláss, ið einki hevði verið at sæð til fyri steðgin, og tí gjørdist hetta ein dystur millum tvey sera ójøvn lið. Nú koyrdi verjan øgiliga væl, samstundis sum Guðrun helt stílin frá fyrra hálvleiki, og tí gjørdist seinni helmingur av seinna hálvleiki einvegis ferðsla.

Fyrstu 10 minuttirnar royndi StÍF at fylgja við, men so fór Tjaldur at líkjast meira og meira einum FM-finalisti, tí verjan var at kalla løst. Í eitt heilt korter skoraði Tjaldur heilar 13 ferðir, uttan at StÍF fekk nakað mál!

At liðið í Runavík er annað og meira enn útlendingar, fekst eisini høvi til at síggja í seinna hálvleiki, tá tað í longum løtum var ein manning uttan teir vanligu profilarnar, ið gjørdi arbeiði. Og tað broytti einki upp á samlaða innsatsin, tí sjálvt ikki tá slapp StÍF upp í part.

Enn eru tvey landskappingarumfør eftir, áðrenn komið verður til FM-finalurnar, men sum tað sá út í gjár, tykist Tjaldur vera í ferð við at finna aftur formin, sum í øllum førum skal til, um liðið ætlar sær at gera nakað við Stjørnuna.

**FAKTA**

**Tjaldur-StÍF 30-14 (9-5)**
**10 min:** 3-1
**20 min:** 7-3
**40 min:** 15-9
**50 min:** 22-11
**Málskjúttar**
**Tjaldur:** Annika Thomsen 8, Adina Petrea 7 (1), Alina Olaru Anghel 6 (1), Heidi á Lakjuni 3, Benadikta Johannesen 2, Jóhanna í Króki 2, Hanna I. Højgaard 1, Mary-Ann Zachariasen 1
**StÍF:** Roxana Bodirlau 7 (2), Anna Petersen 2, Adriana Bobra 1, Fríðrún Danielsen 1, Oddrún Danielsen 1, Rósa Danielsen 1
**Brotskøst:** Tjaldur 2, StÍF 3
**Útvísingar:** Tjaldur 3, StÍF 1
**Dómarar:** Hanus Kúrberg & Hans Thomassen